tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 16.06.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt: Bjarni Hammer, fráboðað og Kristina Roest, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 45/21 | 21/00485-1 | Skúlastýrið -Árligur fundir millum skúlastýrið og TVK (2021) |
| 46/21 | 20/00253-6 | Broytingar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu -matr.nr. 23c, 23m, 145a |
| **Til kunningar** | | |
| 12/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| 13/21 | 21/00413-2 | Ymisk kunning til býráði |
| 14/21 | 21/00382-2 | Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin) |
| 15/21 | 21/00225-8 | Lukka mál |
| 16/21 | 20/00406-4 | Lukka mál |
| 17/21 | 21/00454-2 | Leigusáttmáli millum TVK og Eyðstein Lyngvej -Seglloftið |
| 18/21 | 21/00455-2 | Leigusáttmáli millum TVK og ESp.f. 13-15 -Um leigu av GL.Kgl.Handlinum Pub&Cafe |
| 19/21 | 21/00456-2 | Pakkhús 5 -Leigusáttmáli/avtala við Rókur Tummasarson |
| | | |

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon ynskir kunning um gongdina í BHS Bú- og Heimatænastuna.

Kristin Michelsen viðmerkir, at hann skal heita á leiðsluna í BHS um at møta til ein av komandi býráðsfundum hjá Tvøroyrar kommunu, fyri at kunna um gongdina í BHS.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at áheitan verður sett til leiðsluna á BHS, um at kunning verður um gongdina í BHS til allar bý- og bygdaráðslimir í Suðuroynni.

**Til støðutakan**

## 45/21
## 21/00485-1 Skúlastýrið -Árligur fundir millum skúlastýrið og TVK (2021)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.06.2021 | 43/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 45/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.06.2021)**
Tvøroyrar kommuna hevur tveir regluligur fundir við skúlastýrið og skúlaleiðsluna, at lýsa og viðgerða mál, ið hoyra skúlanum til.

Skúlastýrið valskeiðið (2021-2024) er:

- Sára Ellendersen, Forkvinna
- Regitsa Johannesen, Næstforkvinna
- Annika Jónsveinsdóttir, Foreldraumboð
- Mariann Mikkjalsdóttir, Skúlaumboð
- Alvi Mortensen, Kommunuumboð
- Bjarni Hammer, Kommunuumboð

**Mentanarnevndin 08. juni 2021:**
Einmælt samtykt at kommunustjórin samskiftir við skúlastjóran um at fáa í lag forfund við skúlaleiðslu og skúlastýrið til komandi býráðsfund. Og um hetta ikki ber til, at áseta forfund til septemberfundin.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**46/21**
**20/00253-6 Broytingar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu -matr.nr. 23c, 23m, 145a**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.06.2021 | 46/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 11.06.2021)**
Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fingið ummælið frá Býarskipanarnevndini viðv. broytingum í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu, tykkara j. nr. 01.02.00-P15-1-0

Av tí at Býarskipanarnevndin mælir frá at góðkenna broytingina viðv. matr. nr. 145a, verður ummælið við hesum sent kommununi til viðmerkingar.

Møguligar viðmerkingar frá kommununi skulu vera ráðnum í hendi skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 21. juni 2021. Um eingin viðmerking er komin frá kommununi innan ásettu tíð, verður málið avgreitt sambært teimum upplýsingum, sum nú liggja í málinum.

**Tilmæli frá Lasse Jensen:** Mælt verður til, at taka niðurstøðuna frá Býarskipanarnevndini til eftirtektar. Í sambandi við endurskoðanini av ásetingunum í byggisamtyktini, kunnu vit royna at orða tað soleiðis, at sundurbýti (men ikki útstykking) er loyvt í fríøki, undir ávísum treytum.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Býarskipanarnevndini.
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku deild/Lassa Jensen.

Til kunningar

**12/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**
- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna.

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 26. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

13/21

## 21/00413-2 Ymisk kunning til býráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.05.2021 | 11/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 13/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**

**Kunning til Býráðið**

- Maritimt stuðulspunkt í Norðuratlandshavinum
- Skriv til landstýriskvinnuna í Almennamálum –um Barnabústovn

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 16.06.2021**
-Kunning um uppskot til felagskvøldskúla í Suðroynni
-Kunningarferð til Klaksvík ísamb. við bygging av kapppróðrarneysti

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**14/21**
**21/00382-2 Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 16/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 8/21 |
| 3 Býráðið | 16.06.2021 | 14/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 13.04.2021)**
Posta –Janus Rasmussen- hevur vent seg til kommunustjóran, við ynskið um fund 12. Apríl, at viðgera leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Posta av avgreiðsluhølinum á Sjógøtu 2.

Posta hevur leiga frá Tvøroyrar kommunu í árini 2019 og 2020 alla niðari hæddina, men ynskir frá 2021 at minka um leigumálið, frá 225m$^2$ til 173,5m$^2$. Tvs. at avgreiðsluhøli ikki verður partur av leigumálinum.

Kommunustjórin mælir til at ganga umsóknini á møti, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur millum Tvøroyrar kommunu og Posta, galdandi frá 01.01.2021. -Hetta tó treyta av, at leigugjøld fyri 2019 og 2020 fyrst verða avgreidd.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Einmælt samtykt at takan undir við uppskotinum at leiga Posta 173,M$^2$, tó treya av øll eftirstøða fyri árini 2019 og 2020 er goldin

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað –Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini.

**15/21**
**21/00225-8 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.06.2021 | 15/21 |

**Málslýsing: (Kommunujstjórin 12.06.2021)**
-

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**16/21**
**20/00406-4 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.06.2021 | 16/21 |

**Kommunustjórin 19.12.2020**

-

**Býráðið 16. juni 2021:**

Málið var umrøtt og kunnað

**17/21**
**21/00454-2 Leigusáttmáli millum TVK og Eyðstein Lyngvej -Seglloftið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 42/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 17/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Tvøroyrar kommuna hevur keypt og yvirtikið ogninar eftir TF.Thomsen matr. nr 492a, frá Sp.f. Coldstream pr. 1. mai 2021, har í m.a. var leigusáttmáli við Eyðstein Lyngvej um raksturin av Seglloftinum.

Leigusáttmálin ásetur, at hesin kann av báðum pørtum verða sagdur upp við 3. mnd frest til tann 1. í einum mnd., tó so, at útleigarin og leigari í fyrsta lagi kunna siga leigumálið upp 3. ár eftir at leigumálið tók við hin 13. Juni 2019. Tvs. at leigusáttmálin gongur til 31. Mai 2022.

**Leigugjaldið er ásett:**
- 2019 til kr. 5.000,-
- 2020 til kr. 7.500,-
- 2021 samb. sáttmálanum verður leigugjaldið ásett av nýggjum og ásett samb. prístalinum.
- Leigarin rindar fyri uttan leigugjald fyri nýtslu av el og olju.

Tilmælið er at áseta leigugjaldið fyri 2021 ájavnt við leigusáttmálan, og leigusáttmálin verður óbroyttur við undantak av at útleigarin frá 1. mai 2021 at roknað, verður Tvøroyrar Kommuna.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Einmælt samtykt, at leigugjaldið og sáttmálin heldur áfram óbroyttur fram til 31. mai 2022, tá sáttmálin verður uppsagdur, orsakað av at kommunan ynskir at endurskoða nýtsluna av Seglloftinum.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**18/21**
**21/00455-2 Leigusáttmáli millum TVK og Sp.f. 13-15 -Um leigu av GL.Kgl.Handlinum Pub&Cafe**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 41/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 18/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Tvøroyrar Kommuna hevur keypt og yvirtikið ogninar eftir TF.Thomsen matr. nr 492a, frá Sp.f. Coldstream pr. 1. mai 2021, har í m.a. var leigusáttmáli við Sp.F. 13-15. um raksturin av Gl. Kgl. Handlinum

Leigusáttmálin ásetur, at leigusáttmálin kann av báðum pørtum verða sagdur upp við 3. mnd frest til tann 1. í einum mnd., tó so, at útleigarin og leigari í fyrsta lagi kunna siga leigumálið upp 3. ár eftir at leigumálið tók við hin 13. Juni 2019.

**Leigugjaldið er ásett:**

- 2019 til kr. 5.000,-
- 2020 til kr. 7.500,-
- 2021 samb. sáttmálanum verður leigugjaldið ásett av nýggjum og ásett samb. prístalinum.
- Leigarin rindar fyri uttan fyri nýtslu av el og olju.

Tilmælið er at áseta leigugjaldið fyri 2021 ájavnt við leigusáttmálan, og leigusáttmálin verður óbroyttur við undantak av at útleigarin frá 1. mai 2021 at roknað, verður Tvøroyrar Kommuna.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Bjarni Hammer metti seg verða ógegnigan og fór av fundinum til viðgerðina av hesum málinum-
Einmælt samtykt, at leigugjaldið og sáttmálin heldur áfram óbroyttur fram til 31. mai 2022, tá sáttmálin verður uppsagdur, orsakað av at kommunan ynskir at nýta hølið til annað endamál.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**19/21**
**21/00456-2 Pakkhús 5 -Leigusáttmáli/avtala við Rókur Tummasarson**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 40/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 19/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Tvøroyrar Kommuna hevur keypt og yvirtikið ogninar eftir TF.Thomsen matr. nr 492a, frá Sp.f. Coldstream pr. 1. mai 2021, har í m.a. var avtala við Rókur Tummasarson um rætt til at nýutslu av pakkhús 5, og at hetta var uttan kostnað fyri leigaran.

Tvøroyrar kommuna hevur við keypinum gjørt avtalu við seljaran. Sp.F. Coldstream at omanfyri nevnda avtala er uppsøgd og farin úr gildi við yvirtøkudagin 1. mai 2021.

Avtlan var millum fyrv. eigaran Poul Hansen Adv. at Rókur Tummasarson fekk loyvið til at brúka og broyta pakkhús 5 til savnsbyggning og útstilla lutir, ið siga frá søguni og virkseminum hjá TF. Thomsen. Avtalan var eisini at fiskaplássið skuldi setast í uppruna stand.

Í avtalnuni var ásett, um partanir av einihvørjari orsøk ynskja at siga upp samstarvið og savnið í Pakkhús 5 má lata aftur, hevur Rókur Tummasarson ræðisrættin á lutunum, meðan annað innbúgv, so sum langborð, montrur og ljósskipan er ogn hjá Coldstream.

Mælt verður til, at Tvøroyrar kommuna og Rókur Tummasarson gera avtalu um framhaldandi samstarv, har verandi lutir og skjøl fáa innivist í PH5, og at hetta verður gjørt í samráð við Tvøroyrar Skjalasavn og Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin fær ílag ein fund við Rókur Tummasarsson, Kara Jespersen, Jens Pauli Nolsøe og Bjarna Thomsen fyri at fáa greiðu á savnslutir og søguligu skjølini, ið eru eftir T.F. Thomsen.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

~~Bjarni Hammer~~

~~Kristina Roest~~

Súsanna Bertholdsen